*Stórur áhugi fyri Lopraboring*

# Fleiri enn 20 olju-feløg stóran áhuga

Tað er stórur áhugi fyri at fara undir aftur boring í Lopra. Tá freistin var úti at svara fyrispurningi frá føroysku oljufyrisitingini um áhugi er at vera við til at fíggja eina nýggja boring, hevði oljufyrisitingin fingið svar frá millum 20 og 30 oljufeløgum. Brøv vórðu send út til meira enn 40 feløg fyri stuttum.

Áhugin fyri nýggju boringini, hevur Sosialurin skilt, er umleið tað, sum oljufyrisitingin hevði roknað við.

Umboð fyri tey mongu oljufeløgini koma til Føroya í hesum mánaðinum. Fundur verður í Havn tann 26. oktober, har umboð fyri oljufyrisitingini og danska felagið Dopas fara at greiða frá ætlanini.

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini er í hesum døgum í Danmark, har hann saman við Dopas og DGU leggur síðstu hond á ætlanina.

Tað snýr seg um at borað eitt djúpari hol verandi Loprahol. Holið har er góðar 2000 metrar, og ætlanin er at bora kanska einar 2000 metrar afturat.

Í løtuni seyrar bæði gass og olja upp úr holinum, og Sosialurin hevur skilt, at talan er um "crudeoil", ella ráolju umframt butangass, sum kemur upp úr undirgrundini.

Ein nýggj boring er mett til at kosta einar 30 mill. kr. Við henni er ikki ætlanin at finna olju sum so men at fáa hollan kunnleikan til grótløgini undir basaltinum. At tú longu hevur borað eitt hol, sum inniheldur áhugaverdar upplýsingar, er eitt gott trekkplástur fyri oljufeløgini, tí við eini lutvíst lítlari íløgu kunnu tey fáa sera virðismiklar upplýsingar um løg og sediment, sum aftur kunnu hjálpa til í víðari oljuleitingini.

Ein boring her er eisini munandi bíligari enn um talan er á havinum.



Oljufyrisitingin hevur biðið danska felagið Dopas um at hjálpa sær við verkætlanini, sum skal kunna byrja í mai næsta ár. Tá verður so borurin settur í og fer tað at taka ein mánað at borað 3000 til 4000 metrar niður.

Eingin ivi er um, at oljufeløgini eru sinnað at vera við til at gjalda fyri hesa boring, tí hon kann geva so nógvar áhugaverdar upplýsingar, sum aftur kunnu gera, at oljufeløgini betur fáa lagt til rættis komandi íløgur í øllum økinum.

jan


**KPMG** Pauli Ellefsen p/f

## Starvsfólk

Fyri ein av kundum okkara, eina størri edv-fyritøku í Tórshavn, verður søkt eftir einum fólki at byrja skjótast til ber.

Arbeiði, sum viðkomandi skal røkja, fevnir um:

1. Passa telefonina og avgreiða allar vanligar umsitingarligar uppgávur
2. Hava bókhald felagsins um hendi
3. Veita kundum felagsins vegleiðing í sambandi við nýtslu av edv skipanum.

Viðkomandi, sum verður settur, skal í minsta lagi hava Hægri Handilsskúlaprógv umframt at hava góðan kunnleika til bókhald. Harumframt skal viðkomandi verða fryntligur og nærlagdur.

Nevnast kann, at tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til nýtslu av pc-arum á brúkarastigi. Neyðug upplæring verður tó givin.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Mirjam Haraldsen á tlf. 14944.

Skrivlig umsókn saman við viðmælum verða at senda til *KPMG* Paula Ellefsen p/f í seinasta lagi tann 16. oktober 1995.



**STILLING TILBYDES**

Fylde kuverter
Kr. 3000 g ugentlig,
for info send
Kr. 20 + frankeret
svarekuvert.

Halgerð Tjaldrastein
Ravsted Storegade 31
6371 Bylderup Bov
Danmark



**Kvinnuhúsið**

**Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvørt hóskvøld frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM, Oman Pisuvarða 2, ella á tlf. 17200.**

**Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 10.00–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 10.00 fyrrapart til kl. 7.00 á morgni.**



**Vit flyta smáar og stórar pakkar frá hurð til hurð.**
**Men vit flyta eisini.....** (framhald komandi leygardag)

**EIMSKIP**